Hygg og Hoyr

SJÓNVARP

Tysdagin kl. 21.10

Paper Moon



Amerikanskur filmur gjørdur í 1973, men snýr seg um triatiárini. Peter Bogdanovich hevur skrivað søguna um ein ferðandi svikara ella falsnara, sum fær ein nýggju ára gamla gentu at fylgjast við.

Gentan og falsnaran

Meðan vit hoyra tónleik frá triatiáriunum siggja vit falsnaran Moses, sum móti sínum vilja kemur at fylgjast við nýggju ára gomlu Addie. Hann skal eftir røttum fylgja henni til mostir hennara, men henda gentan vil heldur sleppa onkra aðra staðni. Hon heldur at nú er møguleikin har, at vinna teir 200 dollararnar, sum hon heldur seg eiga, eftir at mamma hennara er deyð, Moses selur bílbliur til einkjur. Hann billar teimum inn, at menninir hjá teimum hava umbiðið bíblurnar hjá honum. Addie lærir nógv av Moses, og tey vinna nógvan pening. Men tá ið Trixie, sum Moses verður forliptur uppá í, kemur upp í leikin, koma trupulleikarnir samstundis...

Ryan O'Neal spælir Moses, dóttir hansara Tatum spælir Addie.


Tysdagin kl. 23.40

Dilemma Maðurin frá Mandalia


Tað er strangliga bannað at handla við narkotika. Men hvat verður gjørt við eitt narkotika-sendiboð, sum kemur í livsvanda – og liv hansara liggur í okkara hondum?

Fólk, sum eru von at taka avgerðir, sita rundan um borðið. Tann sum skipar fyri, er Erik Stephensen.

Keypið føroyskt



– harvið stuðla tit ítróttinum, sum fær 10 oyru av hvørjum pakka



sjónvarpsskráin

Hósdagur 8. juni

19.00 Kærleiki og vald
20.00 Dagur og vika
20.30 Á synini
21.15 Marc og Sophia
21.40 Kriminalitetur millum børn 2:2
22.15 Dempsey og Makepeace
23.00 Í dag Europa í morgin allur heimurin
23.50 Liðugt

Friggjadagur 9. juni

19.30 Barnaløtan
20.00 Dagur og vika
20.30 Sjónvarpið í næstur viku
20.45 Feðgar
21.10 Kærleikans lógir 7:7
22.00 Kavbáturin 3:6
22.55 Summarkvøld í Suðursvøriki
23.45 Liðugt

Leygadagur 10. juni

19.00
20.00 Grannar okkara
20.30 Tilreiðar? Svarað
21.00 Kortspælarin 1:2
22.30

Sunnudagur 11. juni

15.00 Horowitz í Moskva
16.00 Gudstænasta
17.00 Steðgur
19.00 Muppurnar
19.30 Gluggin
20.10 Kortspælarin 2:3
21.40 Andakt
21.50 Pávin Wojtyla 3:3
22.40 Tilvera
23.10 Liðugt

Tysdagur 13. juni


19.20 Tíðindi fyri deyv
19.30
20.00 Dagur og vika
20.30
Skattagentan – jap. gentan
23.15 Liðugt

Hósdagur 15. juni

19.00 Kærleiki og vald
20.00 Dagur og vika
20.30 Á synini
21.15 Eg og harri min
21.40 Aftan fyri Fujisan
22.35 Dempsey og Mak
23.20 Liðugt

Tíðindaskriv

Spennandi várnýggjheit frá BORDANA-KØKUM á Argjum



BORDANA – landsins førandi framleiðari av køkum, bað- og klædnaskápum í góðari dygd, men við lágum prisum – kann nú bjóða kundum sínum spennandi og framkomnar skápshurðar.

Bokatræ-kantar hava í 80-unum verið sera framkomið innan køkar, tá tann føroyski keyparin hevur ætlað sær at broytt um køkin. Men tað hevur verið ein trupulleiki, at teir breiðu skápskantarnir, ið teir vímsku framleiðararnir nyta, geva ofta tá skeivu myndina. Tí er BORDANA – í samvinnu við ein ser-framleiðara, komið fram til ein bokatræ-lista, ið er 1 cm breiður, og sjálvandi vakurt avrundaður í kantunum.

Tann nýframkomni bokatræ-listin verður settur runt eftir kantinum á eini 16 mm melamin framleiddari hurð í hvítum ella grám. Urslitið verður ein køkur við einum framkomnum fráviki – men framvegis fyri ein biligan pening.

Øll teoriin hjá BORDANA-framleiðslu er at levera køk-, bað- ella klædnaskáp í góðari dygd og rimiligum prisi. Og við nýggja tiltaki sínum er tað heilt vist eisini eydnast BORDANA at framleiða eina dygdarvøru fyri ein óhoyrdan lágan pris. Vøran verður framleidd við stórum ómaki á einari framkomnari verksmiðju, og tað verður dentur lagdur á ymiskt, ið kundin kann vera nøgdur við. Viðurskifti, ið tryggja keyparanum eitt væl framleitt og heilt persónlig skápsumhvørvi, oansæð um talan er um køk, bað, klædnaskáp, skrivstovur ella fritíðarrúm.

BORDANA hevur síðan miðjan mars havt ta gleði at kunna selt kundum sínum tær nýggju hurðarnar við bokatræ-kanti, og tað hevur frá byrjanini verið stórur eftirspurningur eftir hesum.

BORDANA hevur lagt dentin á ein nýggjan ljósan og heitan grán lit, og keyparin kann sjálvandi eisini fáa tað vittfevnandi tilhoyrið í reolum, ljóslistum osfr., sum hoskar til tær nýggju hurðarnar, bæði í hvítum og grám melamin.

Kundin kann seta vøruna saman, eftir vegleiðingarfaldara, men sjálvandi kann BORDANA bjóða dugnaligt fólk at seta vøruna saman.

BORDANA hevur gjøgnum sínar samhandlar lagt seg so avgjørt á odda innan køkar, klædnaskáp og bað, og kundar okkara hava avgjørt, eftir okkara meting, verið nøgdir.

Sparitiðir ella ikki, BORDANA væntar eina stóðuga framgongd innan søluna – lágprisinum fyri at takka.

Sj

Sól[illegible] asystir til barna
d[illegible] ella eftir avtal
[illegible]

[illegible] in [illegible] Landssjúkrahúsið, 3-100 Torshavn.